# JUVÉL II á veg til Klaksvík

**Leygardagin verður móttøka í Klaksvík, tá missiónsskipið Juvél II kemur til Føroyar. Tá verður skipað fyri almennari móttøku**



Tá skipið mikukvøldið fór úr Hirtshals skipaði samkoman á Malta fyri farvælmøti. Herman Mørkøre, sum er ein av stigtakarunum til nýggja skipið, segði m.a., at mongu ætlaninar, sum lógu í kortinum, áðrenn skipið varð keypt, eru ikki til í dag, men skipið er keypt og er nú liðugt at fara í sigling.

Aftaná møti bjóðaði samkoman til drekka og so varð farið oman á kajuna at siga farvæl. Millum 30 og 40 fólk vóru savnaði á havnarlagnum í Hirtshals har tað eisini varð sungið.

16 fólk eru við. Gullak Madsen, sum sjálvur hevur átt skip í fleiri ár, er skipari á ferðini til Føroyar. Brøðurnir Sámal og Sólbjørn á Toftini, Helgi Laksafoss, Olaf Olsen, Skærði Thomassen og Óli Steinberg eru mynstraðir sum manning á ferðini til Føroyar.

Juvel II hevur áður siglt fyri donsku marinuna, og var áður grámálað eins og øll hini skipini. Nú er tað hvítmálað. Júst henda litbroytingin verður tikin sum eitt ítøkiligt tekin um, at skipið ikki longur er í eini jørðiskari hertænastu, men í eini andaligari hertænastu. Hetta kemur greitt til sjóndar, tí frammi á bógnum er kristna fiskateknið ICTUS málað, og á sjálvum skortsteininum er ein opin bíblia málað við áskriftini Jóhannes 3,16.

Juvél hevur ligið í Hirtshals síðani í vár, og har hava nógv fólk arbeitt til tess at fáa skipið liðugt. Á brúnni er øll nýmótans útgerð, sum tey stóru skipini hava í dag.

Tá skipið kemur á Klaksvík verður móttøka, har Klaksvíkar hornorkestur spælir og sangkórið í Betesda kemur at syngja. Røður verða hildnar, har eisini 92 ára gamli Jógvan Gerðalíð kemur at siga nøkur orð.

Juvél II er skrásettur á oyggjunum Saint Kitts og Nevis, við heimstaði í Bassaterre.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin lækkar hann niður í útsynning. Turt og sólglottar og hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og suðri og eitt skifti regn ella mjørki. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Týsdagin upp í hvassan vind av landsynningi og regn ella mjørki, týsdagin nakað minni vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 10 og 14 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 25 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 33 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 33 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 29 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 13 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1002 hPa. sunnan fyri Ísland fer eystureftir og dýpist. Tað gevur høgætt komandi samdøgur.



**Í dag:**
Hátrýstið norðan fyri Azorurnar stendur mestsum í stað. Ein hátrýstryggur til havið vestan fyri Ísland verður yvir Føroyum sunnudagin. Ein tropisk ódn "BERTHA" sunnan fyri New Foundland fer í landnyrðing

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/07 kl. 06⁰⁰ – 14/07 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,9°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 13/07 kl. 06⁰⁰ – 14/07 06⁰⁰.
Avfallið higartil í juli: 51 mm




Lesið Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

14. juli Mánin longst frá jørðini
18. juli Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. juli | 7:36 | 19:57 | 6:36 | 18:57 | 6:51 | 19:12 | 9:36 | 21:57 | 10:36 | 22:57 | 5:51 | 18:12 |
| 19. juli | 8:18 | 20:38 | 7:18 | 19:38 | 7:33 | 19:53 | 10:18 | 22:38 | 11:18 | 23:38 | 6:33 | 18:53 |
| 20. juli | 8:59 | 21:18 | 7:59 | 20:18 | 8:14 | 20:33 | 10:59 | 23:18 | 11:59 | - | 7:14 | 19:33 |
| 21. juli | 9:38 | 21:57 | 8:38 | 20:57 | 8:53 | 21:12 | 11:38 | 23:57 | 0:18 | 12:38 | 7:53 | 20:12 |
| 22. juli | 10:16 | 22:35 | 9:16 | 21:35 | 9:31 | 21:50 | - | 12:16 | 0:57 | 13:16 | 8:31 | 20:50 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. juli | 4:51 | 17:12 | 7:51 | 20:12 | 8:51 | 21:12 | 7:21 | 19:42 | 8:36 | 20:57 |
| 19. juli | 5:33 | 17:53 | 8:33 | 20:53 | 9:33 | 21:53 | 8:03 | 20:23 | 9:18 | 21:38 |
| 20. juli | 6:14 | 18:33 | 9:14 | 21:33 | 10:14 | 22:33 | 8:44 | 21:03 | 9:59 | 22:18 |
| 21. juli | 6:53 | 19:12 | 9:53 | 22:12 | 10:53 | 23:12 | 9:23 | 21:42 | 10:38 | 22:57 |
| 22. juli | 7:31 | 19:50 | 10:31 | 22:50 | 11:31 | 23:50 | 10:01 | 22:20 | 11:16 | 23:35 |